UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Eysturkommuna
Oyran 2
512 Norðragøta
Føroyar

Tórshavn, tann 28. januar 2022
J.nr.: 21/22721-7
At tilskila í svari
Viðgjørt:
Tygara skriv:

*Góðkenningarskriv*

**Serstøk byggisamtykt fyri økið á Kráartanga í Leirvík**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir hevur Eysturkommuna í skrivi, dagfest 27. oktober 2021, sent Umhvørvis- og vinnumálaráðnum uppskot til serstaka byggisamtykt fyri C2-økið á Kráartanga matr. nr. 169a í Leirvík til góðkenningar.

Serstaka byggisamtyktin ásetir treytir, staðseting og hædd fyri byggingina.

Broytingin hevur ligið frammi frá 6. til 29. september 2021. Tá freistin at koma við møguligum mótmælum ella broytingaruppskotum var farin hevði kommunan einki mótmæli ella broytingaruppskot móttikið.

Býarskipanarnevndin hevur havt málið til ummælis og mælir í ummæli, dagfest 3. januar 2022 til at góðkenna serstøku byggisamtyktina fyri økið á Kráartanga í Leirvík.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið tekur undir við ummælinum frá Býarskipanarnevndini, og ætlar at góðkenna serstøku byggisamtyktina fyri økið á Kráartang í Leirvík.

Sagt verður frá, at Umhvørvis- og vinnumálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir serstøku byggisamtyktina fyri økið á Kráartanga í Leirvík

Mint verður á, at hóast ráðið nú hevur góðkent broytingina í byggisamtyktini fyri Eysturkommunu eftir reglunum í býarskipanarlógini, so sleppur kommunan ikki undan at fáa til vega møguligar aðrar góðkenningar frá øðrum myndugleikum. Víst verður til kunngerð nr. 57 frá 27. apríl 2001 um kommunala byggimálsviðgerð.

Hjálagt serstøk byggisamtykt fyri økið á Kráartanga í Leirvík við átekning frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum.

Vegna Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Kristvør H. Poulsen

# SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI ØKIÐ Á KRÁARTANGA Í LEIRVÍK

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Eysturkommunu, ið nevnt er í 1. grein.

## §1. ØKI SAMTYKTARINNAR

Stk. 1. Økið ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfestu kortskjølum 1 dagf. 15.03.2021, matr. nr. 169a, Leirvík og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir nevndu ognum.

## §2. FRÁGREIÐING UM ØKIÐ

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtykt er at skipa bygging á økinum.

Stk. 2. Útstykkingin er uml. 13.200 m$^2$ til støddar og liggur í einum C2 øki, sum sambært almennu byggisamtyktini kann brúkast til vinnu- og miðstaðarendamál við serstakari byggisamtykt.

Stk. 3. Økið er eitt leiguøki, t.v.s. at Kommunan leigar økir út til áhugaði at byggja á og gerð leigusáttmála við viðkomandi, um økið.

Stk. 4. Pláss skal vera fyri bilastøðlum sambært kortskjali 1.

Stk. 5. Vegatgongd til Vinnuøkið á Kráartanga er frá Fjøruvegnum.

Stk. 6. Á kortskjalinum er innteknað stødd og staðseting av bygningum. Hesi kunnu verða reguleraði, í sambandi við prosjektering og matrikulering.

Stk. 7. Fyri viðurskifti, sum ikki eru regularaði í hesi serstøku byggisamtykt eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktin fyri Eysturkommunu galdandi.

## §3. NÝTSLA ØKISINS

Stk. 1. Økið verður kannað vinnu, handlum, bústovnum, bústøðum og skrivstovum í umhvørvisflokki 2 og 3. .

## §4. BYGGING, STØDD, STAÐSETING

4.1. Økið á Kráartanga er eitt planerað øki (grótuppfylling út á sjógv) sum Kommunan hevur gjørt og eigur.
Kommunan hevur samtykt at gera eina ætlan, sí kortskjal 1, hvussu byggingin skal verða skipa á økinum og at leiga økir eftir hesi ætlan, til áhugaði at byggja á.
Kommunan ger so leigusáttmála við tey sum byggja.
Í byggiætlanini fyri Kráartanga, eru eisini økir løgd av til parkeringspláss.

4.2. **Mest loyvdu hæddir**

1. Bygningar kunnu í mesta lagi byggjast í 2 hæddum. Hæddin, máld frá veghædd og til mønuna, má ikki vera hægri enn 8,30 m.

2. Kota á gólvinum á veghædd, verður ásett av byggimyndugleikanum.

4.3 **Hall á tekju**

1. Hall á tekju skal vera millum 25 og 35 stig.

4.4 **Byggistigið**

1. Byggistigið á hvørjum matrikli sær, er 1,0.

## §5. ÚTSJÓND HÚSANNA

Øll bygging í økinum, sum byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggifultrúan. Hetta skal eisini tinglesast í skeytið fyri allar ognirnar.

5.1. Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

## §6. BYGGINGARMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Byggingarmyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Eyturkommunu býráð einsamøllum.

## §7. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR Í HENNI.

Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

| UMHVØRVIS - OG VINNUMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 21/22721 |
| Ætlanarskriv: | 12-1-2022 |
| Góðkent: | 28-1-2022 |
| Váttað: | K Poulsen |

# Kortskjal 1




| | | | |
|---|---|---|---|
| Mál: Bygging til vinnu- og miðstaðarendamál á Kráartanga í Leirvík<br>Serstøk byggisamtykt - Byggiætlan | Teknað: SG<br>Mát: 1:500<br>Dagfest: 15-03-2021<br>Broytt: | Tekn. nr.<br>(99) 1 01 |

Eysturkommuna - Oyran 2 - FO-510 Gøta - tel.: 73 00 00 - Fax: 73 00 01 - mail: eystur@eystur.fo